# Byggir nógvar og bíligar íbúðir í Havn

**Arbeiðið upp á størsta íbúðarbyggjarí í Føroyum nakrantíð er byrjað og Høgni Mikkelsen sigur, at tað stórur áhugi fyri at fáa íbúð**

ÍBÚÐARBYGGING
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Høgni Mikkelsen er ein av teimum heilt stóru byggimeistarunum tá ið íbúðarbygging umræður. Nú er hann farin undir íbúðarbyggjarí í Havn, sum er størsta einstaka íbúðarbygging í Føroyum nakrantíð og hann sigur eisini, at prísurin er so lágur, at tað gerst ikki bíligari í høvuðsstaðnu*

Tað er stórur áhugi at fáa íbúð í Havn.

Tað kann Høgni Mikkelsen skriva undir uppá.

Hann er nú farin undir eina stóra íbúðarbygging í Berjabrekku í Havn og hann sigur, at tað er heilt stórur áhugi fyri at selja.

Hetta verður størsta einstaka íbúðarbyggjarí í Føroyum nakrantíð, tí tað eru ikki færri enn 68 íbúðir í teimum átta blokkunum hann byggir uppi Berjabrekku.

Í hvørjum blokki eru 7-9 íbúðir.

Arbeiðið at grava út er byrjað og væntandi verður klárt at byrja við hamaranum í februar næsta ár.

Høgni Mikkelsen sigur, at gongst sum ætlað, verða íbúðirnar lidnar og klárar at flyta inn í tíðliga á vári í 2006.

Høgni Mikkelsen er gamal í garði tá ið húsabygging umræður og hann má metast ímillum teir stóru húsabyggjararnar í Havn.

Hann hevur smíðað síðani 1981 og higartil hevur hann smíðað og selt yvir 130 hús og tá ið hesar íbúðirnar eru lidnar, fer talið upp um 200.

Men eitt skifti upp á trý ár mitt í ringastu kreppuni í nítiárunum, var hann burtur og tá arbeiddi hann í Noregi, Danmark og í Týsklandi.

### Blandað fólkaslag

Íbúðirnar, sum nú verða bygdar á Berjabrekku eru í trimum støddum. Nakrar eru 63 fermetrar, nakrar eru 75 fermetrar og so eru nakrar upp á 125 fermetrar. Hóast byggingin er ikki meiri enn komin í eygað, hevur hann longu selt ikki færri enn 21 íbúðir av teimum 68 íbúðunum, sum verða bygdar.

– Allar tær størstu íbúðirnar upp á 125 fermetrar eru longu seldar. Annars eru nakrar av hinum báðum støddunum eisini seldar.

Og byggimeistarin sigur, at tað er eitt blandað fólkaslag, sum hevur biðið um íbúð.

– Talan er bæði um ung húski, sum ikki eiga hús frammanundan. Men talan er eisini um fleiri eldri fólk, sum taka hetta høvið til at sleppa sær av við eini tyngjandi stór sethús fyri at fáa sær eina minni íbúð ístaðin.

– Sostatt verður tað eitt ógvuliga fjølbroytt umhvørvið, vit fáa uppi á Berjabrekku og tað kann bara vera ein stórur fyrimunur fyri trivnaðin.

Hann heldur eisini, at hetta vísir, at saknur hevur verið í júst hesum slagi av íbúðarbygging.

Men hann heldur eisini, at ein orsøk til, at tað er so stórur áhugi fyri íbúðunum, er, at tær verða seldar fyri sera kappingarførar prísir. Hann sigur, at tær minstu íbúðirnar verða seldar fyri 950.000 krónur, íbúðirnar upp á 75 fermetrar verða seldar fyri 1,1 millión og tær størstu íbúðirnar upp á 125 fermetrar, verða seldar fyri 1,350.000 millión.

– Men tá er alt við. Tað er bara at fáa innbúgvið inn, so er búgvandi í húsunum.

Høgni Mikkelsen leggur afturat, at hann brúkar heldur ikki tað at krevja eitt ávíst gjald í forskoti frá teimum, sum biðja um íbúðir fyri at binda tey.

Sjálvur heldur Høgni Mikkelsen ikki at tað kann gerast bíligari. Men hann sigur, at dygdin er ikki verri fyri tað, um íbúðirnar eru bíligar.

– Dygdin er heilt avgjørt í lagi. Orsøkin til, at hvør íbúð er so bílig, er, at talan er um so stórt tal og tað fer prísin á hvørjari einstakari niður og so skal tað heldur ikki undirmetast, at hann hevur so drúgvar royndir av íbúðarbygging, sigur byggimeistarin.

# Stórur áhugi hjá ferðamannaskipum at koma til Føroyar

**Í ár hava 36 útlendsk ferðamannaskip verið í Føroyum og longu nú hava aftur 36 boðað frá, at tey koma næsta ár**

FERÐAVINNA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað verður størri og størri áhugi hjá útlendskum ferðamannaskipum at koma til Føroya.

Tað vil siga til Havnar, tí tey koma øll inn á Havnina

Vanliga hava nøkur og tjúgu fremmand ferðamannaskip verið í Føroyum um árið, men í ár hava ikki færri enn 36 útlendsk ferðamannaskip verið í Havn.

Tað er tað mesta, sum hevur verið.

Men líkt er til, at tað metið verður tikið longu næsta ár.

Jónsvein Lamhauge, havnafúti í Havn, sigur, at longu nú hava 36 útlendsk ferðamannaskip biðið um pláss á Havnarvág komandi ár.

Hann sigur, at útlendsk ferðamannaskip eru von at biðja um pláss í góðari tíð, men av tí, at vit bara eru í oktober enn, er tað ógvuliga sannlíkt at okkurt kemur afturat næsta ár.

Skipini eru ógvuliga ymisk til støddar.

Havnarfútin sigur, at størstu skipini, sum vóru í Havn í fjør vóru Crystal Symphony og Rotterdam. Hann heldur eisini, at hetta eru størstu skipini, sum hava verið í Havnini.

Tey bæði skipini eru um 238 metrar long. Til samanberingar kann nevnast, at Norrøna er 160 metrar long, so talan er um ordiligar risar.

Crystal Symphonie kemur aftur til Føroya næsta summar.

Tað er ilt at siga, hvaðani hesi skipini eru, tí tey allarflestu sigla undir hentleikaflaggi.

*Crystal Symphonyer eitt kent ferðamannaskip í Føroyum og tað er eisini ímillum størstu skip, ið hava verið í Havnini. Áhugin hjá fremmandum ferðamannaskipum at koma hendavegin bara veksur. Crystal Symphony kemur aftur næsta summar*



Men meginparturin av ferðafólkunum eru amerikanarar, men tað eru eisini nógvir bretar og týskarar og ímillum.

Tær allarflestu krússaraferðirnar byrja í Hamburg ella í Bremen og koma so norðureftir, vestanfyri Bretlandi, kanska inn í Hetlandi á veg til Føroya og so suðuraftur framvið Noregi.

Onnur koma norður eystanfyri og leggja inn í Føroyum og fara síðani vestureftir til Íslands og Grønlands og kanska heilt yvir til Amerika.

Steðgurin í Føroyum eru ikki langir, vanliga liggja skipini einar 6 - 8 tímar.

### Ymisk ferðafólk

Vanliga myndin av ferðafólkinum, sum er við slikum skipum, er, at talan er um eldri fólk, sum eru væl fyri fíggjarliga.

Men Havnarfútin heldur, at hendan myndin er broytt eitt sindur.

Útboðið av krússaraferðum er stórt og tað ger, at slíkar ferðir eru ikki heilt so dýrar longur, sum tær hava verið.

Sostatt er hetta slagið av feriu eisini blivið atkomuligt hjá einum størri skara av fólki, enn vanligt hevur verið.

Samstundis ger tað stóra útboðið, at tey, sum skipa fyri slíkum ferðum, royna at lokka fleiri fólk við og tískil eru nú eisini yngri fólk at síggja ímillum ferðafólki, eins og tað heldur ikki er óvanligt at síggja húski við børnum við slíkum ferðum.



# Ætla at byggja nýtt Berøa í Saltangará

**- Men helst verður bíðað við byggingini, til komið er undir land á Toftum, sigur Oddur Lamhauge**

SAMKOMUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*Berøa er gamla Ebenezer, sum varð tikið niður í Havn miðskeiðis í sekstiárunum og sett uppaftur í Saltangará*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Nógv ymiskt virksemi er í Berøa í Saltangará, og sum tíðin er liðin, eru hølini vorðin ov trong og ótíðarhóskandi. Bygningurin er smalur, og møguleikarnir eru avmarkaðir. Hugsandi er tó, at tað enn gongur ein tíð, áðrenn ein nýggjur bygningur stendur uppi á økinum, har Berøa er í dag.

### Takast niður

Oddur Lamhauge veit at siga, at ein nevnd er sett at fyrireika bygging, og í henni sita Ábraham Løkin, Áki í Skemmuni og Magnus Rasmussen.

- Ætlanin er at taka gamla húsið niður og byggja ein nýggjan bygning, sum fer at venda eystur og vestur. Samstundis er ætlanin at »flyta« okkum nakað longur suður.

Oddur sigur, at nýggi bygningurin verður heilt øðrvísi enn hin verandi – við einum trivaligum kjallara og stórum sali, sum fer at hava ymiskar møguleikar.

Hann heldur ikki, at neyðugt verður at veksa um sjálvt grundøkið, men talan er um at fáa meira burtur úr økinum, sum er niðanfyri.

- Sum eg havi skilt, umhugsar kommunan at lyfta lendið í niðara borð upp, soleiðis at meira fæst burtur úr økinum norður ímóti posthúsinum, eitt nú til nýggj parkeringsøki, sum tørvur altíð er á,vísur Oddur á.

### Gamal bygningur

Berøa í Saltangará hevur sína søgu.

- Hetta er gamla Ebenezer, sum miðskeiðis í sekstiárunum varð tikið niður í Havn og sett uppaftur í sama stíli her í Saltangará.

Oddur heldur, at bygningurin soleiðis er eini 100 ára gamal.

- Men hetta veit onkur meira at siga um enn eg, leggur hann aftrat.

Á Toftum byggir brøðrasamkoman nýtt Nebo á økinum norðanfyri Føroya Banka, og her er tað Haldur Vang, byggimeistari, sum hevur eftirlit við byggingini.

- Eg vænti, at byggiætlaninar í Saltangará fara at bíða, til komið er undir land á Toftum um eini tvey ár ella so. Tað er eitt ov stórt tak hjá brøðrasamkomuni at hava tvær slíkar byggingar í gongd í senn og við tað, at vit bíða eitt sindur í Saltangará, kunnu vit stuðla uppundir byggingina á Toftum, sigur Oddur Lamhauge.

### Nógv virksemi

Í Berøa í Saltangará eru annars nógv ymisk tiltøk gjøgnum vikuna.

Fríggjakvøld eru ungdómsmøtir, leygarkvøld hugnaløta og sunnudagar er sunnudagsskúli og breyðbróting. Sunnukvøld er eisini evangeliskt møti, og mikukvøld er bønarmøti.

Mánadag og týsdag eru bíbliutímar fyri ung, og mikukvøld er dramabólkur.

Í Berøa er eisini kvinnumøti annan hvønn mánadag.

# Ikki rætt, at MBF er skert í ári teirra brekaðu

**- Eg haldi, at tað bert kann skapa ringan stemning at síggja viðurskiftini so einfalt, sum málið um játtanina til MBF er gjørt til, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður**

JÁTTAN
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*- Eg eri væl nøgdur við tað góða arbeiði, sum MBF og tess limafeløg gera fyri at betra um umstøðurnar hjá teimum sjúku og brekaðu. Hetta arbeiði virðismeti eg høgt, sigur landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu*

Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður, er ikki samdur við formanninum í Giktafelag Føroya, Leilu Solmunde og dagliga leiðaran í MBF, Onnu Suffíu Durhuus, um, at hann hevur skert fíggjarligu møguleikarnar hjá meginfelagnum og tess limafeløgum í ári teirra brekaðu.

### Størri játtan

Í ár hevur MBF fingið 500.000 krónur aftrat teimum 900.000 krónunum, sum meginfelagið fær á fíggjarlógini. Haraftrat setti eg í samband við ár teirra brekaðu ein stýringsbólk, sum fekk 300.000 krónur at ráða yvir. Hesin peningur er ætlaður til nýtslu á grasrótastøði, sum Páll tekur til. Tað merkir, at fyritøkur og felagsskapir - og harvið eisini MBF og tess limafeløg - hava kunnað søkt um pening úr grunninum til ymiskt tiltøk til tess at varpa ljós á tey sjúku og brekaðu í samfelagnum.

Landsstýrismaðurin vísir á, at samlaða játtanin í hesum ári til endamál, sjúkum og brekaðum at gagni, tískil er økt við 800.000 krónum - og ikki skerd við 500.000 krónum, sum ført hevur verið fram.

- Eg haldi, at tað bert kann skapa ringan stemning at síggja viðurskiftini so einfalt, sum málið um játtanina til MBF er gjørt til.

Páll vísir á, at sambært fíggjarlógaruppskotinum fær MBF somu játtan komandi ár, sum felagið hevur fingið í fleiri ár.

- Við teirri fíggjarlóg, vit hava og teimum útlitum, sum eru, noyðist eg sum landsstýrismaður at fyrihalda meg til tey fakta, sum eru. Eitt er, hvat vit øll kunnu droyma um. Annað er veruleikin, soleiðis sum hann er. Tiskil verður játtanin til MBF komandi ár tann sama, sum hon hevur verið seinastu árini.

Hann vísir á, at tann skerjing, sum er á hesum øki, er sambært fíggjarlógarupskotinum ein 2% skerjing av játtanini til Javna og Sinnisbata, sum beinleiðis eru á fíggjarlógini.

### Ein hattur

- Eg havi nevnt møguleikan, at øll feløgini undir MBF koma undir ein hatt fíggjarliga, soleiðis at tey einstøku feløgini eisini fáa ein fíggjarligan styrk. Í slíkum føri havi eg eisini sagt meg sinnaðan at arbeiða fyri eini samlaðari øktari játtan.

Landsstýrismaðurin heldur, at samhaldsfesti millum feløgini hevði verið betur, um tey vóru undir einum »hatti«, sum tók sær av at tala søk teirra sjúku og brekaðu.

- Eg eri annars væl nøgdur við tað góða arbeiði, sum hesi feløg - hvør í sínum lagi - gera til tess at betra um umstøðurnar hjá teimum sjúku og brekaðu. Hetta arbeiði virðismeti eg høgt, sigur landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu.